UTTANRÍKIS- OG
MENTAMÁLARÁÐIÐ
SEPTEMBER 2020

# BÓKASØVN EIN MANNARÆTTUR

## Álit um dagføring av bókasavnslógini



# Innihald

Dagføring av bókasavnslógini ........ 3
Tilmælini samanumtikin ........ 4
Bókasøvn ein mannarættur ........ 8
Bókasavnslóggávan ........ 10
Universitetsbókasavn ........ 12
Høvuðsbókasavnsuppgávan ........ 14
Bókasavnsgjaldið ........ 16
Stuðulsskipanir ........ 19
Talgildar tænastur ........ 22
Bókmentir í úrvali ........ 24

ISBN 978-99918-852-6-1

Álit um dagføring av bókasavnslógini
Forsíðumynd: Laura Vinther

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
FO-100 Tórshavn
Tel. 306500
www.ummr.fo
September 2020

# Dagføring av bókasavnslógini

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, setti í mars 2020 ein arbeiðsbólk at skriva álit um dagføring av bókasavnslógini.

Arbeiðssetningurin var at lýsa nærri tey øki í bókasavnslógini, har neyðugt er við broytingum í mun til verandi lóggávu, og koma við uppskotum um broytingar, serliga við atliti at:

- Ásetingum um universitetsbókasavn
- Heimild at áseta minstamark í mun til útgjald av bókasavnsgjaldinum
- Dagføring av stuðulsskipanini til fólkabókasøvnini, bæði viðv. rakstri og bygging
- Høvuðsbókasavnsuppgávuni
- Talgildum tilfari

Arbeiðsbólkurin hevur havt eina røð av fundum, bæði fysiskum og virtuellum, nú tað gjørdist neyðugt orsakað av Covid-19 farsóttini. At viðgera einstøku evnini í arbeiðssetninginum hevur arbeiðsbólkurin eisini havt fundir við áhugapartar, millum annað umboð fyri fólka- og skúlabókasøvnini, Fróðskaparsetur Føroya, Kommunufelagið, Rithøvundafelagið og Bókavarðafelagið.

Við hesum áliti kemur arbeiðsbólkurin við uppskotum um dagføringar av løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005.

Uppskotini um dagføringar taka støði í tí arbeiði og teimum álitum, ið áður eru gjørd á bókasavnsøkinum, og íblástur er fingin úr bókasavnslóggávu í øðrum londum, serliga Íslandi, Noregi og Danmark. Bókasavnsmanifestini hjá UNESCO/IFLA hava virkað sum leiðreglur fyri arbeiðinum. Harafturat hevur tað verið læruríkt at lesa uppskot og viðmerkingar til tær løgtingslógir, ið hava verið samtyktar í Løgtinginum gjøgnum tíðina.

Vit vóna, at álitið um dagføring av bókasavnslógini kann verða grundarlag undir komandi broytingum í lóggávuni á bókasavnsøkinum.

Vegna arbeiðsbólkin,
tann 21. september 2020

Annika Smith
Landsbókavørður, Landsbókasavnið

Arnbjørn Ó. Dalsgarð
Bókasavnsráðgevi, skrivari

Johan Ísak Suni Hansen
Fyrisitingarstjóri, Fróðskaparsetur Føroya

Eyðun Christiansen
Stjóri, Kommunufelagið

Vónbjørt Vang
Býarbókavørður, Býarbókasavnið
Næstforkvinna, Rithøvundafelagið

Jenny Lydersen
Undirvísingarleiðari, Uttanríkis- og mentamálaráðið

Arngarð Weihe
Fulltrúi, Uttanríkis- og mentamálaráðið
Forkvinna

# Tilmælini samanumtikin

Stóru broytingarnar, ið eru farnar fram í samfelagnum síðani aldarskiftið, ikki minst innan hægri útbúgving og á tøkniliga økinum, hava við sær, at tørvur er á umfatandi broytingum í bókasavnslógini frá 2001.

Tilmælini í hesum áliti taka støði í, at bókasøvnini fremja upplýsing, útbúgving og mentanarligt virksemi, og at bókasøvnini hava ein týðandi mentanarligan, útbúgvingarligan, búskaparligan og sosialan týdning - fyri tann einstaka og fyri samfelagið sum heild.

Fólkabókasøvnini og skúlabókasøvnini eru kommunalir stovnar, og tí verður hildið, at størri broytingar í stuðulskipanunum og í bygnaðinum á økinum eiga at verða gjørdar í samráð við kommunurnar. Mælt verður tí til, at landið og kommunurnar so skjótt sum gjørligt taka upp samráðingar um, hvussu virksemið hjá fólkabókasøvnunum og skúlabókasøvnunum eigur at verða skipað.

Talgildu tænasturnar eru vorðnar ein alt størri partur av virkseminum hjá bókasøvnunum, og tað hevði tí verið ynskiligt við eini bókasavnslóg, sum í størri mun er orðað út frá fortreytunum í okkara talgildu øld og er lagað til tær talgildu tænasturnar, sum eru ein alt størri partur av bókasavnsvirkseminum.

Tað er greitt, at við broytingum í lóggávuni á bókasavnsøkinum fylgja broyttar fíggjarligar fortreytir fyri virkseminum. Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett um fíggjarligu avleiðingarnar av einstøku tilmælunum, tí hildið verður, at tað arbeiðið eigur at verða gjørt í sambandi við, at lógaruppskot verður orðað, og møguligar rammuavtalur verða gjørdar.

Tað er átrokandi, at bókasavnslógin verður dagførd, arbeiðsbólkurin mælir tí til, at uppskot um dagføring av bókasavnslógini verður lagt fyri Løgtingið so skjótt sum gjørligt. Arbeiðsbólkurin mælir til, at hesar broytingar verða gjørdar í bókasavnslóggávuni:

Broytingar í stuðulsskipanum og talgildum tænastum krevja umfatandi broytingar í verandi bókasavnslóg. Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at broytingar á hesum økjum verða gjørdar í uppskoti til nýggja bókasavnslóg, heldur enn sum dagføringar til verandi løgtingslóg.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at hesar broytingar verða gjørdar í bókasavnslóggávuni:

## *Universitetsbókasavn*

Mælt verður til at ásetingin, at Landbókasavnið veitir vísindabókasavnstænastu, verður nágreinað við nýggjum ásetingum um, at Landsbókasavnið eisini verður universitetsbókasavn.

Nærri ásetingar um ábyrgdarøki og fígging verða settar í avtalum millum ávikavist Landsbókasavnið, Fróðskaparsetur Føroya og Uttanríkis- og mentamálaráðið.

## *Høvuðsbókasavnsuppgávan*

Mælt verður til, at Landsbókasavnið - sum høvuðsbókasavn - fær heimild at útveita partar av bókasavnstænastunum, sum Landsbókasavnið nú veitir fólkabókasøvnum og skúlabókasøvnum, og at ásetingin um bókastovu verður strikað úr lógini.

Avtalur um útveiting verða gjørdar millum Landsbókasavnið og viðkomandi stovn.

## *Bókasavnsgjaldið*

Mælt verður til, at landsstýrismaðurin fær lógarheimild til at gera reglur um bókasavnsgjald og harundir at áseta minstamark fyri ta upphædd, ið kann verða goldin einstaka móttakaranum. Skotið verður upp, at upphæddin fyri minstamark verður sett til kr. 500.

Mælt verður til, at ásetingin um bókasavnsgjald verður víðkað til at fevna um alt útlánstilfar, sum er fevnt av upphavsrætti, tvs. eisini talgilt tilfar, og at nærri treytir verða ásettar í kunngerð.

## *Bókasavnsráð*

Mælt verður til, at landið setur á stovn og ber kostnaðin av einum bókasavnsráði við breiðari umboðan frá landi, kommunum, stovnum, fakfólkum og áhugabólkum.

Bókasavnsráðið skal hava til endamáls at viðgera og ráðgeva í bókasavnspolitiskum og bókasavnsfakligum málum, sum hava við menning og samskipan av almenna bókasavnsøkinum at gera hjá bæði landi og kommunum.

## *Ljóðbøkur og e-bøkur*

Mælt verður til, at ásetingarnar um útvegan av ljóðbókum o.ø. tilfari til teirra, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið ella á annan hátt fáa ognað sær vanligan prentaðan tekst, verða nágreinaðar í nýggjum ásetingum um almenna ljóðbókatænastu, og um at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur eru til taks á landsins bókasøvnum umvegis netið.

## *Lánisamstarv*

Mælt verður til áseting um, at alt útlánstilfar á almennum og kommunalum bókasøvnum skal vera fevnt av leiðreglum um lánisamstarv millum bókasøvn, bæði innanlands og uttanlands.

## *Fakliga viðkomandi útbúgving*

Mælt verður til, at ásetingin, um at leiðarin á einum fólkabókasavni skal vera útbúgvin bókavørður, verður broytt til, at starvsfólk skal hava fakliga viðkomandi útbúgving.

## Stuðulsskipanir

Við støði í at øll hava rætt til bókasavnstænastur, verður mælt til, at allar kommunur skulu veita sínum borgarum fólkabókasavnstænastu. Skotið verður upp, at kommunur kunnu gera avtalu um fólkabókasavnstænastur við aðrar kommunur ella við at skipa samstarv millum fleiri kommunur.

Tað verður sett sum treyt, at fólkabókasøvn hava fólk við fakliga viðkomandi útbúgving í starvi ella gera avtalu um, at verða knýtt at bókasavni, ið hevur útbúgvið starvsfólk í starvi.

Mælt verður til, at stuðulin til rakstur og bygging av fólkabókasøvnum, og stuðulin til undirvísingaramboð til skúlabókasøvn verður tikin av, og at onnur stuðulsskipan verður funnin, sum er lættari at umsita.

Har fólkabókasøvn og skúlabókasøvn eru í somu hølum verður mælt til, at hædd verður tikin fyri, at staðseting, innrætting, tilfar og upplatingartíðir verða lagað soleiðis, at bæði fólkabókasavnið og skúlabókasavnið kann tæna sínum málbólkum á bestan hátt, eisini teimum, ið hava skerdar førleikar.

## Talgildar tænastur

Mælt verður til, at talgilda menningin sæst aftur í bókasavnslógini, og at atgongd til talgilt tilfar verður javnsett við annað tilfar.

# Bókasøvn ein mannarættur

> *"Frælsi, vælferð og samfelagslig menning, og umstøður, sum stimbra persónligu menningini, eru grundleggjandi menniskjalig virði. Hesi virði eru grundað á, at væl upplýstir borgarar sleppa at brúka teirra demokratisku rættindi og fáa høvi til at spæla ein aktivan leiklut í samfelagnum. Ein konstruktivur hugur at taka lut og demokratisk menning eru treytað av eini nøktandi útbúgving og fríari og óavmarkaðari atgongd til vitan, tankar, mentan og informatión"*

Brotið omanfyri er tikið úr altjóða yvirlýsing um fólkbókasøvn frá UNESCO, ST-stovninum fyri útbúgving, vísind og mentan í samstarvi við IFLA, altjóða sambandinum fyri bókasøvn og bókasavnsfelagsskapir. Yvirlýsingin varð gjørd við støði í grein 19 í ST-mannarættinda-sáttmálanum um frælsi til at hava og bera fram áskoðanir og um at søkja sær og breiða út vitan og hugsanir.

Sambært yvirlýsingini eru bókasøvnini vegurin til vitan og ein hin mest avgerandi fortreytin fyri útbúgving, sjálvstøðugari støðutakan og mentanarligu menningini hjá tí einstaka og samfelagnum sum heild.

Í arbeiðinum við at dagføra bókasavnslógina er tað tí eisini týdningarmikið at geva sær far um, at bókasøvnini eru grundstuðlar í fólkaræðinum - at bókasøvnini eru ein mannarættur.

Umframt at vera stovnar fyri vitan og upplýsing, hava bókasøvnini stóran týdning fyri trivnaðin hjá borgarum og integratión av tilflytarum. Leikluturin hjá bókasøvnunum at fremja lesihugin, at miðla kunnleikan til og skapa áhuga fyri máli og bókmentum er alsamt vorðin meiri virkin. Menningin á bókasavnsøkinum er stór, ikki minst á talgilda økinum.

Fortreytin er, at øll bókasøvn, ið eru stuðlað við almennum pengum, eru almenn og opin, og at øll hava atgongd til vitan og upplýsingar.

Afturat yvirlýsingini um fólkabókasøvn, samtyktu IFLA/UNESCO yvirlýsing um skúlabókasøvn í 1999. Í yvirlýsingini verður víst á, at skúlabókasøvn eru ein týðandi liður í útbúgvingartilgongdini, og at skúlabókasøvn hava ein týðandi leiklut í menningini av lesi- og skriviførleikum, kunningarførleikum, undirvísing, læring og mentan.

Í 2009 varð IFLA/UNESCO yvirlýsing um margmentanarlig bókasøvn samtykt á aðalfundi í UNECSO. Við yvirlýsingini varð dentur lagdur á, at bókasøvn hava ein týðandi leiklut, tá tað snýr seg um integratión. Bókasøvn eiga tí at fremja og stuðla mentanarligum og málsligum margfeldi, virka fyri tvørmentanarligum samskifti og luttøku í samfelagnum.

Í 2011 varð IFLA/UNESCO yvirlýsingin um talgild bókasøvn samtykt. Yvirlýsingin vísir á, at atgongd til upplýsing er ein fortreyt fyri lívlangari læring og útbúgving. Við talgildu tænastunum á bókasøvnunum verður latið upp fyri, at øll kunnu fáa atgongd til heimins mentanarliga og vísindaliga arv. Neyðugt er við serstakari lóggávu á talgilda økinum og við fíggjarligum stuðli at menna og tryggja varandi atgongd til talgilt tilfar - bæði tilfar, sum er talgilt í sínum uppruna, og tilfar, sum er talgilt seinni.

Av øðrum yvirlýsingum hjá IFLA eigur yvirlýsing um bókasavnstænastur til fólk við skerdum lesiførleikum at verða nevnd. Yvirlýsyingin tekur støði í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, og staðfest verður, at atgongdin til bókasavnstænastur eisini er galdandi fyri fólk við skerdum lesiførleika. Í hesum høpi eigur talgilda tøknin at verða gagnnýtt og ment, so upplýsing, vitan og undirhald á bókasøvnunum er atkomuligt hjá øllum.




*Hugsavnan á Hvalbiar skúlabókasavni. Mynd: Nita Næs*

# Bókasavnslóggávan

Síðani fyrsta løgtingslógin á bókasavnsøkinum, løgtingslóg um landsbókasavn, kom í gildi í 1952, hevur samfelagið verið fyri stórum broytingum. Ikki minst á útbúgvingarliga økinum er stór menning farin fram. Fróðskaparsetur Føroya, sum varð sett á stovn í 1965, hevur seinastu árini ment seg til at verða fremsta val hjá føroyskum ungdómi í lestrarørindum. Hetta setur stór krøv til bókasavnstænsturnar hjá landinum, og ynski hava í fleiri ár verið sett fram, um at fáa skipað eitt universitetsbókasavn. Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya kom í 2008. Í lógini eru ongar ásetingum um universitetsbókasavn, men dagføringin frá 2012 heimilar samstarvi við onnur universitet og aðrar viðkomandi stovnar.

Í 1968 kom løgtingslóg um fólkabókasøvn. Í hesum tíðarskeiði vórðu fleiri nýggj fólkabókasøvn sett á stovn. Lógin hevði ásetingar um, at landið rindaði 60 % av rakstrarútreiðslunum hjá fólkabókasøvnum og lat 50 % í byggistudningi. Í lógini um fólkabókasøvn var eisini ein áseting um studning til rithøvundar, ið skriva á føroyskum.

Við løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn frá 1988 varð ásetingin um studning til rithøvundar broytt til eina áseting um bókasavnsgjald til rithøvundar svarandi til 8 % av samlaðu játtanini til bókasøvn.

Nýggja lógin skipaði landið í 7 meginbókasavnsdømi við hvør sínum væl útbygdum fólkabókasavni. Eisini vóru ásetingar um eitt bókasavnsráð og um skipan av eini bókastovu, staðsett í Norðstreymoy, sum skuldi veita bókasavnstænastur til fólkabókasøvnini, skipa fyri skeiðsvirksemi og býta út bókasavnsgjaldið. Framsøkna ætlanin um at skipa landið við meginbókasøvnum varð tó ongantíð veruleiki, og ætlanin at skipa bókastovu í Norðstreymoy varð heldur ikki framd. Í seinni lógarbroyting vórðu hesar uppgávur lagdar til Landsbókasavnið.

Skúlabókasøvnini, sum longu í 1979 vórðu umrødd í fólkaskúlalógini, fingu sín egna kapittul í lógini um megin-, fólka- og skúlabókasøvn við ásetingum um, at landið lat 60 % í studningi til undirvísingartilfar og -amboð. Stuðulsskipanin til fólkabókasøvn við 60 % í rakstrarstuðli og 50 % í byggistudningi helt fram.

Í 2001 kom løgtingslóg um bókasøvn, sum savnaði lóggávuna á bókasavnsøkinum í eina lóg. Meginbókasøvnini, sum ikki vóru fingin at virka, vórðu strikað úr lógini. Rakstrarstuðulin til fólkabókasøvnini var nú ásettur til í mesta lagi 60 % av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið.

Í 2001 kom eisini fyrsta løgtingslógin um gransking. Vøksturin í føroyskari gransking tey síðstu 20 árini og menningin í føroyska samfelagnum sum heild hava við sær, at krøvini til bókasavnstænastur eru vorðin størri, ikki minst innan vísindabókasavnstænastur. Granskingarlógin varð dagførd í 2006 og aftur í 2020.

Í 2004 var aðalorðaskifti á Løgtingi um stuðulsveitingar á mentanarøkinum. Í álitinum varð ásannað, at samsvar ikki er millum játtanir og tørv, og at tað tí var neyðugt, antin at játta væl fleiri pengar til endamálini ella at endurskoða lógar- og játtanargrundarlagið. Í álitinum mælti Mentamálaráðið til, at kommunurnar átaka sær størri fíggjarliga ábyrgd av tí mentanartilboði, sum stendur lokalsamfelagnum í boði. Álitið mælti til at endurskoða bókasavnslógina við atliti at ásetingunum um stuðulsgrundarlag og meginbókasøvn.

Bókasavnslógin varð dagførd í 2005 við tilmælunum frá álitinum um stuðulsveitingar á mentanarøkinum. Stuðulin til fólkabókasøvn varð lækkaður til at vera roknaður í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini, tó í mesta lagi 40 % av góðkendari fíggjarætlan, og kapittulin um meginbókasøvn varð strikaður.

Í 2007 mælti ein arbeiðsbólkur til at lata kommunurnar bera raksturin av fólkabókasøvnunum.

Í 2013 lótu umboð fyri Landsbókasavnið og Fróðskaparsetur Føroya úr hondum eitt álit um skipan av universitetsbókasavni, og í 2014 varð mælt til samráðingar millum land og kommunur um at býta landið upp í bókasavnsøki við hvør sínum meginbókasavni og at skipa samstarv um talgildar bókasavnstænastur.

Í 2018 varð aftur ein roynd gjørd at koma á mál við dagføringum av bókasavnslógini, serliga við atliti at at skipa Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn. Hóast drúgvu tilgongdina, er bókasavnslógin frá 2005 framvegis galdandi.

Hesin arbeiðsbólkurin varð settur í mars 2020. Grundarlag fyri tilmælunum, sum er orðað í hesum áliti, eru fundir í arbeiðsbólkinum og við viðkomandi áhugapartar, altjóða leiðreglur á økinum, umframt tey uppskot og tilmæli, ið eru gjørd seinastu árini.

Niðanfyri eru einstøku evnini í arbeiðssetninginum lýst, og tilmæli gjørd um uppskot til broytingar í mun til verandi bókasavnslóg.



*Tær binda á Vestmanna bókasavni. Mynd: Gyðja Hjalmarsdóttir Didriksen*

# Universitetsbókasavn

## Lýsing av økinum

Landsbókasavnið hevur heilt frá fyrstu lógini í 1952 havt sum uppgávu at fáa til vega og geva atgongd til vísindaligar bókmentir. Í galdandi lóg frá 2001, seinast broytt í 2005, stendur í § 3, stk. 8, at eitt av endamálunum við Landsbókasavninum er í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar vísindaligar stovnar at veita vísindabókasavnstænastu. Føroysk lóggáva, herundir løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya frá 2008, hevur ikki aðra áseting um universitets- ella vísindabókasavnsuppgávur enn hesa.

Fróðskaparsetur Føroya og Landsbókasavnið hava eina skrivliga avtalu um skipan og raðfesting av uppgávum á setursbókasavninum, seinast dagførd í 1998. Síðan tá er stór menning og víðkan farin fram bæði á Fróðskaparsetri Føroya og innan gransking og hægri útbúgving sum heild, og hetta setir nógv størri krøv til vísindabókasavnstænastu, enn Landsbókasavnið við verandi orku megnar at veita.

Í áliti um landsbókasavn og universitetsbókasavn frá januar 2013 er niðurstøðan, at stórur tørvur er á at fáa skipað eitt føroyskt universitetsbókasavn, og at tað helst er neyðugt at smíða lógarverk um universitetsbókasavn ella fáa aðra fasta skipan. Víst verður til danska og íslendska lóggávu, har ávikavist Det Kgl. Bibliotek og Landsbókasafn - Háskólabókasafn røkja uppgávuna sum universitetsbókasavn. Danska bókasavnslógin hevur eins og tann føroyska eina áseting um, at skipað verður fyri vísindabókasavnstænastu, og rammuavtalur eru síðan gjørdar millum Det Kgl. Bibliotek og universitetini og millum Det Kgl. Bibliotek og Kulturministeriet. Íslendska lógin hevur, umframt eina bókasavnslóg, eina stovnslóg fyri Landsbókasafn Íslands – Háskólabókasafn, sum nágreinar virksemið hjá stovninum.

Uppgávan sum universitetsbókasavn kann vera ymist sett saman, men grundleggjandi er talan um tríggjar høvuðsuppgávur, sum eru:

1. at tryggja atgongd til so nógv og gott vísindaligt tilfar sum til ber (gransking, tíðarrit, leitigrunnar, bøkur o.a.)

2. at skipa fyri undirvísing og skeiðum fyri granskarum, lærarum, lesandi og øðrum í at brúka vísindaligar dátugrunnar, leitiskipanir, fjarlániskipanir o.a., og

3. at bjóða teimum lesandi, lærarum og granskarum góðar umstøður, pláss og hentleikar av ymsum slag at stuðla undir teirra lestur og gransking, bæði hølisumstøður, lesistovu, lesiklivar og atgongd til tekniska útgerð, sum tørvur er á.

Fróðskaparsetur Føroya arbeiðir saman við Uttanríkis- og mentamálaráðnum o.ø. við einari kampusætlan fyri eitt nýtt Fróðskaparsetur, og í hesi ætlan hevur universitetsbókasavnið ein týðandi leiklut sum miðdepil í allari ætlanini. Landsbókasavnið kann sum universitetsbókasavn vera við til at tryggja, at henda ætlan verður framd á ein slíkan hátt, at universitetsbókasavnið lýkur allan tann tørv, sum eitt nútíðar universitet hevur á vísindabókasavnstænastum.

Ein arbeiðsbólkur, ið tók málið upp aftur til viðgerðar í 2018, mælti til at broyta bókasavnslógina, so at Landsbókasavnið eisini verður universitetsbókasavn. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum tilmæli. Við áseting um at virka sum universitetsbókasavn fylgja krøv og skyldur, sum ikki eru í verandi lóggávu, og tað verður mett sum eitt betri og meiri bindandi grundarlag at byggja samstarvið á enn tað verandi.

# Tilmæli

Mælt verður til, at leikluturin hjá Landsbókasavninum sum universitetsbókasavn verður staðfestur í lógini við í minsta lagi teimum omanfyri nevndu uppgávum.

Mælt verður til, at Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn verður granskingarbókasavn og í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya skipar fyri undirvísing og gransking á høgum stigi innan kunningar- og bókasavnsfrøði í Føroyum.

Mælt verður til, at neyvari ásetingar um Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn verða gjørdar í avtalum millum Fróðskaparsetur Føroya, Landsbókasavnið og Uttanríkis- og mentamálaráðið, herímillum hvør ber kostnaðin fyri hvat, og hvussu ábyrgdarbýtið annars verður skipað.

Mælt verður til, at universitetsbókasavnið eisini verður staðfest í komandi dagføring av løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya.




*Lesandi á Landsbókasavninum. Mynd: Haldur Suni Johansen*

# Høvuðsbókasavnsuppgávan

## Lýsing av økinum

Landsbókasavnið virkar eftir galdandi lóg sum høvuðsbókasavn fyri alt landið.

Høvuðsbókasavnsuppgávan er ein rúgvusmikil uppgáva, umframt at Landsbókasavnið er tjóðbókasavn og granskingarbókasavn. Við lógini frá 1988 varð ein roynd gjørd at sleppa Landsbókasavninum undan nøkrum av hesum uppgávum við at seta á stovn eina Bókastovu staðsett uttan fyri Landsbókasavnið, sum skuldi taka sær av teimum. Pengar vórðu ongantíð játtaðir til ætlanina, og tá lógin aftur varð broytt í 2001, varð Bókastovan skipað sum deild á Landsbókasavninum.

Uppgávurnar hjá Bókastovuni eru lýstar í kapittul VII í bókasavnslógini. Bókastovan samskipar innkeypið av bókum og øðrum tilfari til fólka- og skúlabókasøvnini og ger tilfarið klárt til bókasøvnini. Landsbókasavnið fær eisini til vega tilfar, sum hini bókasøvnini ikki sjálvi hava, gjøgnum lánisamstarv við bókasøvn, innanlands og uttanlands, og við at hava egna goymslu av bókum og øðrum lánitilfari.

Ásett er, at Bókastovan skipar fyri upplýsandi tiltøkum um bókasavnstilfar, fyri skeiðsvirksemi og eftirútbúgving av starvsfólki og fyri árliga býtinum av bókasavnsgjaldinum. Harafturat er ásett, at Bókastovan útvegar ljóðbøkur o.a. tilfar til teirra, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið ella á annan hátt fáa ognað sær vanligan prentaðan tekst, og ger tilfarið atgeingiligt. Í áliti um ljóðbøkur og e-bøkur frá februar 2015 er niðurstøðan, at tað er ein almenn uppgáva at tryggja, at eitt nøktandi útboð av ljóðbókum er atkomuligt umvegis eina ljóðbókatænastu. Tað er somuleiðis niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, at føroyskar ljóðbøkur og e-bøkur eiga at vera til taks á landsins bókasøvnum umvegis netið.

Í álitinum um ljóðbøkur og e-bøkur verður mælt til, at ljóðbókatænastan verður skipað sum serbókasavn eins og í grannalondum okkara, og at tænastan eigur at verða skipað sum partur av høvuðsbókasavnsuppgávuni á Landsbókasavninum, og at almenna uppgávan verður nágreinað í eini dagføring av lóggávuni.

Nú talan er um at styrkja leiklutin hjá Landsbókasavninum sum universitetsbókasavn, er tað vorðið meira aktuelt enn nakrantíð, at Landsbókasavnið letur frá sær partar av høvuðsbókasavnsuppgávuni.

Fleiri av uppgávunum, sum í dag liggja hjá Bókastovuni, kunnu væl veitast øðrum at reka, m.a. alt tað, sum í dag er inntøkufíggjað, so sum keyp og klárgering av bókum til fólkabókasøvnini og skúlabókasøvnini. Útveitingin kann verða gjørd við avtalu við stovn ella felag, ið hevur førleikar at átaka sær uppgávuna, t.d. eitt av størru fólkabókasøvnunum.

Hinvegin eigur tann parturin av høvuðsbókasavnsuppgávuni hjá Landsbókasavninum, sum er at standa fyri menningini av samlaða bókasavnsvirkseminum í landinum, at vera styrktur. Arbeiðsbólkurin heldur, at eitt bókasavnsráð við breiðari umboðan av myndugleikum og stovnum á bókasavnsøkinum hevði verið eitt  gott amboð í menningini og samskipanini á bókasavnsøkinum.

Í Danmark samstarva kommunurnar um menningina á bókasavnsøkinum. Í Íslandi er eitt bókasavnsráð skipað, sum umframt menning og samskipan eisini stendur fyri útgjaldi av bókasavnsgjaldi og stuðulsveiting. Hildið verður tó, at í Føroyum liggur ábyrgdin av teimum uppgávunum best hjá Landsbókasavninum.

# Tilmæli

Arbeiðsbólkurin mælir til, at uppgávan hjá Landsbókasavninum sum høvuðsbókasavn verður staðfest og lýst í lógini, og at Landsbókasavnið samstundis fær heimild til at útveita partar av høvuðsbókasavnsuppgávuni.

Mælt verður til, at landið setur á stovn og ber kostnaðin av einum bókasavnsráði við breiðari umboðan frá landi, kommunum, stovnum, fakfólkum og áhugabólkum, sum hevur til endamáls at viðgera og ráðgeva í bókasavnspolitiskum og bókasavnsfakligum málum, sum hava við menning og samskipan av almenna bókasavnsøkinum at gera hjá bæði landi og kommunum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at kapittul VII í bókasavnslógini, “Bókastova”, verður strikaður, og í hesum sambandi 1) at ásetingin í henni um bókasavnsgjaldið fær ein kapittul fyri seg, 2) at ásetingin um uppgávuna at útvega ljóðbøkur og e-bøkur verður nágreinað, og 3) at ásetingarnar um keyp og klárgerðing av bókum og øðrum tilfari til fólkabókasøvn og skúlabókasøvn verður partur av høvuðsbókasavnsuppgávuni, ið Landsbókasavnið kann útveita.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at útbúgvingar- og skeiðstilboð til bókavørðir, skúlabókavørðir og onnur starvsfólk á bókasøvnum verða nágreinað sum partur av høvuðsbókasavnsuppgávuni hjá Landsbókasavninum í samstarvi við viðkomandi útbúgvingarstovnar, eitt nú Fróðskaparsetur Føroya.

Mælt verður til, at landið umvegis Landsbókasavnið raðfestir og tekur stig til samstarv við kommunurnar um talgildar bókasavnstænastur fyri fólka- og skúlabókasøvn.

Tí verður mælt til, at tað í kapitli I í lógini verður ásett, at alt útlánstilfar á almennum og kommunalum bókasøvnum eigur at verða fevnt av leiðreglum um lánisamstarv millum bókasøvn, bæði innanlands og uttanlands.

Tó eigur møguleiki at vera at avmarka útlán av ávísum tilfari, um serligar umstøður tala fyri tí, eitt nú um talan er um lesistovutilfar ella tilfar, sum ein lærari, granskari ella lesandi í eitt ásett tíðarskeið hevur brúk fyri at hava við hondina.




*Smábørn á Klaksvíkar bókasavni. Mynd: Annika Egholm*

# Bókasavnsgjaldið

## Lýsing av økinum

Bókasavnsgjald er árlig játtan á løgtingsfíggjarlógini sum gjald frá landinum til rithøvundar, týðarar og í ávísum førum myndlistafólk fyri rættin at læna út bøkur teirra uttan viðurgjald gjøgnum bókasøvnini. Tá viðkomandi doyr, varðveitir eftirlivandi hjúnafelagi rættin til bókasavnsgjaldið.

Sambært § 21, stk. 1, pkt. 5 í bókasavnslógini skipar Bókastovan á Landsbókasavninum fyri árliga býtinum av bókasavnsgjaldinum, og sambært stk. 2 ásetir landsstýrismaðurin reglur um býtið av bókasavnsgjaldinum. Seinasta reglugerðin fyri býtið av bókasavnsgjaldinum er frá 2003.

Í løgtingslóg um fólkabókasøvn frá 1968 varð ásett, at á hvørjum ári vórðu játtaðar kr. 10.000, ið lutast rithøvundum, sum skriva á føroyskum máli, og hvørs bøkur verða læntar út av fólkabókasøvnunum. Við lógarbroytingini í 1980, varð ásetingin broytt til 2,5 % av samlaða rakstrarstudninginum til fólkabókasøvn. Í lógini um megin-, fólka- og skúlabókasøvn frá 1988 varð umsitingin av bókasavnsgjaldinum lagt til Bókastovuna, og ásetingin broytt til at vera 8 % av allari játtanini til megin-, fólka- og skúlabókasøvn og av játtanini til Føroya Landsbókasavn.

Í bókasavnslógini frá 2001 var ásetingin um, at bókasavnsgjaldið skuldi vera 8 % av samlaðu játtanini, broytt. Eingin %-satsur varð nevndur, men í viðmerkingunum verður mælt til, at upphæddin til bókasavnsgjaldið verður ásett til kr. 1.442.000,00, frá tí at lógin verður sett í verk. Upphæddin svaraði til 10% av játtanini til føroyska bókasavnsverkið, og 10% av játtanini til Landsmiðstøðina fyri Undirvísingaramboð í 2001. Bókasavnsgjaldið skuldi nú býtast til føroyskar rithøvundar og týðarar og til myndlistafólk, tá myndir eru í minsta lagi 40% av bókini. Ásett er eisini, at landsstýrismaðurin í mentamálum ásetir reglur um býtið av bókasavnsgjaldinum. Ætlanin var, at árliga hækkingin í bókasavnsgjaldinum skuldi svara til árliga vøksturin av føroyskum bókum á hesum bókasøvnum, soleiðis at samsvar altíð var ímillum vøksturin av føroyskum bókum og hækkingina í bókasavnsgjaldinum. Í viðmerkingunum stóð eisini, at so hvørt sum bókasøvnini í vinnu- og miðnámsskúlunum verða skipað, eigur bókanøgdin á hesum søvnum eisini at verða tald við í uppgerðina til bókasavnsgjaldið.

Játtanin til bókasavnsgjaldið varð tó ikki hækkað eftir ætlan, og framvegis verða ikki øll tey nevndu bókasøvnini tald við í uppgerðina. Í 2019 varð játtanin til bókasavnsgjaldið hækkað við kr. 500.000 upp í kr. 1.500.000.

Bæði Landsbókasavnið og Rithøvundafelag Føroya hava sett ynski fram um at fáa reglurnar dagførdar. Landsbókasavnið hevur ført fram, at reglugerðin er tíðarkrevjandi og trupul at umsita. Ynskið hjá Rithøvundafelagnum er at fáa meiri gjøgnumskygni í umsitingina av bókasavnsgjaldinum, og at fáa játtanina til endamálið hækkaða.

Í samráði við Landsbókasavnið og Rithøvundafelagið hevur verið arbeitt við ætlanum um at broyta minstamarkið fyri, nær bókasavnsgjald verður latið høvundum, til kr. 1.000. Í donsku lógini um bókasavnsgjald er minstamarkið kr. 1.250.

Lógartænastan hjá Løgmansskrivstovuni hevur víst á, at landsstýrismaðurin eigur at hava heimild í bókasavnslógini at áseta ávíst krónutal sum mark fyri, nær bókasavnsgjaldið verður útgoldið, og at reglurnar eiga at verða skipaðar í kunngerð heldur enn reglugerð. Tí verður tað mett at vera neyðugt við broyting í bókasavnslógini, sum gevur landsstýrismanninum hesa heimild.

Í juli 2020 boðaði Rithøvundafelagið frá, at aðalfundurin hjá felagnum ikki tók undir við einum marki á kr. 1.000 og heldur ikki við verandi marki á 50 bøkur.

Verður hvørki eitt mark fyri tal av bókum ella eitt minstamark fyri krónutal ásett í lógini, so hava allir rithvøundar, ið hava tilfar skrásett í føroysku bókaskránni, rætt til bókasavnsgjald og talið á teimum, ið fáa bókasavnsgjald, fer úr 316 upp í 870 móttakarar av bókasavnsgjaldinum. Tað fer eisini at hava við sær, at krónuvirðið á hvørjari bók fer at minka.

Arbeiðsbólkurin heldur, at bókasavnsgjaldið verður ov smábýtt, um einki minstamark er fyri útgjaldi, og mælir tí til, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta eitt minstamark á kr. 500 í lógini. Spurningurin er umrøddur við Rithøvundafelagið, ið tekur undir við einum minstamarki á kr. 500.

Verandi reglur um bókasavnsgjald umfata ikki e-bøkur og netljóðbøkur, sum verða læntar út gjøgnum talgildar bókasavnsskipanir, men ein skipan við útláni av føroyskum e-bókum og ljóðbókum fæst vónandi at virka í 2021, og tí má í bókasavnslógini hædd verða tikin fyri bókasavnsgjaldi fyri e-bøkur og ljóðbøkur á netinum.

Enn er støða ikki tikin til, hvussu gjaldið fyri e-bøkur og ljóðbøkur fer at verða avgreitt, men tað fer at verða hugt eftir skipanunum aðrastaðni. Í Danmark vórðu 6 % av játtanini til bókasavnsgjaldið settar av til e-bøkur og ljóðbøkur í 2020. Enn er ikki greitt, um tað eydnast at fáa ásetingarnar um bókasavnsgjald fyri e-bøkur og ljóðbøkur við í kunngerðina í ár.



*Søguløta á Bókasavninum við Løkin. Mynd: Oyvør Dam Jacobsen*

# Tilmæli

Mælt verður til, at áseting um býti av bókasavnsgjaldi verður sett í ein kapittul fyri seg í bókasavnslógini, og at tað verður staðfest, at tað er ein partur av høvuðsbókasavnsuppgávuni hjá Landsbókasavninum.

Mælt verður til, at geva landsstýrismanninum lógarheimild til at áseta minstamarkið fyri, nær bókasavnsgjald verður latið høvundum til kr. 500.

Mælt verður til, at landsstýrismaðurin í lógini fær heimild til at gera neyvari ásetingar um bókasavnsgjaldið í kunngerð, herundir at bókasavnsgjald eisini skal latast fyri e-bøkur og ljóðbøkur á netinum.



*Vitjandi á Bókasavninum við Løkin. Mynd: Tórður Mikkelsen*

# Stuðulsskipanir

## Lýsing av økinum

Landið hevur øll árini, síðan fyrsta lógin um landsbókasavn kom í gildi í 1952, í størri og minni mun latið studning til bókasøvn kring landið, bæði til rakstur og bygging av fólkabókasøvnum umframt studning til undirvísingarambоð í skúlabókasøvnum.

Í løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. frá 1968 vórðu skipanir við studningi til rakstur og bygging av fólkabókasøvnum settar í verk, og eru hesar skipanir varðveittar við smærri broytingum í øllum lógum, sum síðan eru komnar.

Talan er í dag um tríggjar stuðulsskipanir: 1) stuðul til rakstur av fólkabókasøvnum (í mesta lagið 40% av góðkendari fíggjarætlan), 2) stuðul til bygging (50% av góðkendari byggiætlan), og 3) stuðul til undirvísingartilfar og -amboð á skúlabókasøvnunum (60% av góðkendari fíggjarætlan).

Tá bókasavnslógin var til viðgerðar í Løgtinginum í 2001, varð ábyrgdarbýtið millum land og kommunu umrøtt. Í viðmerkingum til lógaruppskotið vísti Føroya Kommunufelag til nýggju kommunustýrislógina og eftirlýsti eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunu, eins og kommunudeildin á Løgmansskrivstovuni hevði ta viðmerking, at skal uppgávan at reka fólkabókasøvn vera kommunal, eiga kommunurnar eisini at fáa fulla fíggjarliga ábyrgd. Ásetingarnar um stuðul vórðu tó ikki broyttar, men í 2005 samtykti Løgtingið við lógarbroyting, at studningurin frá 2006 skuldi roknast í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini.

Skipanin er umsitingarliga tung fyri bókasøvnini, sum á hvørjum ári skulu lata inn serstaka fíggjarætlan og grannskoðaðan roknskap fyri at fáa studning. Eisini Landsbókasavnið brúkar lutfalsliga stóra orku upp á at umsita skipanina.

Í 2007 mælti ein arbeiðsbólkur, har kommunurnar eisini vóru umboðaðar, til at taka av rakstrarstuðulin fyri at fáa greiðari viðurskifti á økinum, men enn er lógin ikki broytt.

Í áliti um visjónir og viðmerkingar til uppkast til lógaruppskot um bókasavnsvirksemi frá oktober 2014 varð víst á, at skipanin við rakstrarstuðli til fólkabókasøvnini kundi vera ein forðing fyri nýskapan á økinum. Víst varð á, at stuðul eftir §§ 14 og 19 verður latin eftir góðkendari fíggjarætlan, men at virksemið er væl størri enn stuðulsjáttan er til.

Í 2013 kostaðu fólkabókasøvnini kr. 13.611.695 at reka, harav stuðulin frá landinum var kr. 2.822.681, svarandi til 21%, meðan kommunurnar fíggjaðu kr. 10.789.014, svarandi til 79%. Fólkabókasøvnini við Løkin og Býarbókasavnið i Havn fingu í 2013 bert dekkað ávikavist 6% og 17% av rakstrarkostnaðinum frá landinum. Í 2019 kostaðu fólkabókasøvnini kr. 16.435.406 at reka, harav stuðulin frá landinum var kr. 2.844.000 svarandi til 17%, meðan kommunurnar fíggjaðu kr. 13.594.406, svarandi til 83%. Kostnaðurin at reka fólkabókasøvnini er vaksin, og tað eru kommunurnar, ið bera tann hækkaða kostnaðin.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin um skipanina við studningi við Kommunufelagið, mentanarleiðarar og fólkabókasøvn kring landið. Semja er um, at verandi skipan forðar fyri menning av fólka- og skúlabókasøvnunum og hildið verður, at avmarkaði stuðulin frá landinum hevði verið betri brúktur til eitt nú menning av tænastum á bókasavnsøkinum.

Útgangsstøðið er, at øll hava rætt til bókasavnstænastur, at fólkabókasøvn eru kommunal, og at tað er ábyrgdin hjá øllum kommunum at veita sínum borgarum bókasavnstænastur.

Arbeiðsbólkurin ásannar tó, at møguleikarnir hjá fleiri kommunum í landinum einsamallar at reka eitt fólkabókasavn á fullgóðan hátt eru sera avmarkaðir, og at tað tí er neyðugt at finna eina loysn, har bókasavnseindirnar ikki verða ov smáar, men verða forsvarliga røktar av fakfólki og kunnu veita nøktandi tænastur, sum tað verður orðað í áliti um visjónir og viðmerkingar frá oktober 2014.

Í bókasavnslógini er ásett, at leiðarin á einum fólkabókasavni skal vera útbúgvin bókavørður. Útbúgvingin til bókavørð er seinastu árini broytt, og útbúgvingarheitið bókavørður verður ikki brúkt longur. Í flestu førum er í dag talan um kandidatútbúgving í informatiónsvísindum, mentanarmiðlan ella líknandi. Mælt verður tí til, at ásetingin verður broytt til, at starvsfólk skal hava fakliga viðkomandi útbúgving.

Í fleiri kommunum eru fólka- og skúlabókasøvn staðsett í somu hølum. Málbókarnir hjá fólkabókasøvnunum og skúlabókasøvnunum eru sera ymiskir, og tí er neyðugt, at viðurskifti so sum staðseting, innrætting, tilfar og upplatingartíðir verða lagað, so at bókasøvnini eru atkomulig hjá øllum, og at bókasavnstænastan er á einum nøktandi støði hjá øllum málbólkum.

Í fólkaskúlalógini er ásett, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum fólkaskúlum sambært § 30 í fólkaskúlalógini, har ásett er, at hvør sjálvstøðugur skúli vanliga skal fata um í minsta lagi 3 samanhangandi floksstig. Eisini er ásett, at skúlabørn í forskúlaflokki skulu læra at brúka bókasøvn.

Í bókasavnslógini er ásetingin í fólkaskúlalógini endurtikin, og arbeiðsbólkurin heldur, at tað er rætt, at ásetingar um skúlabókasavn eru í fólkaskúlalógini, og at víst verður til tær í bókasavnslógini. Hetta tryggjar samstarv millum skúlamyndugleikar og bókasavnsmyndugleikar, ið er av stórum týdningi fyri menningina á økinum. Í hesum sambandi skal eisini verða víst til yvirlýsing um skúlabókasøvn hjá UNESCO/IFLA. Eins og í yvirlýsing um fólkabókasøvn, er grundarlagið, at skúlabókasøvn eru fyri øll, og víst verður til tann stóra týdning, ið skúlabókasøvn hava fyri læring, menning og gleðina við at lesa.

Arbeiðsbólkurin heldur tó, at ásetingarnar um skúlabókasøvn eiga at verða broyttar til, at øll skúlabørn eiga at hava atgongd til skúlabókasøvn.



*Vitjandi á Klaksvíkar bókasavni. Mynd: Annika Egholm*

# Tilmæli

Mælt verður til, at samráðingar verða tiknar upp við kommunurnar um at dagføra bókasavnslógina á fólka- og skúlabókasavnsøkinum út frá hesum fortreytum:

- At allar kommunur skulu hava fólkabókasavn ella á annan fullgóðan hátt veita sínum borgarum fólkabókasavnstænastu.

- At øll skúlabørn hava atgongd til skúlabókasøvn.

- At kommunur kunnu samstarva við aðrar kommunur um at veita fólkabókasavnstænastu, herundir eisini um keyp av tilfari.

- At verandi skipaninar við studningi frá landinum til fólka- og skúlabókasøvn verða strikaðar úr lógini og at landið og kommunur í staðin samráðast um aðra skipan.

- At fólkabókasøvnini skulu hava starvsfólk við bókasavnsfakligari ella aðrari fakliga viðkomandi útbúgving.

- At útbúnir skúlabókavørðir starvast á skúlabókasøvnunum.

# Talgildar tænastur

## Lýsing av økinum

Talgilt tilfar er nevnt í bókasavnslógini, har tað í § 3 er álagt Landsbókasavninum at savna, skráseta og varðveita allar føroyskar bókmentir, eisini ljóðbøkur, talgilt og teldutøkt tilfar, tónleik, film og annað av-tilfar. Tá lógin er frá 2001, er tað tó greitt, at talgilda menningin hevur broytt krøvini til tær bókasavnstænastur, ið eiga at verða veittar.

Enn hevur ongin atgongd til føroyskar netljóðbøkur, e-bøkur, filmar ella tónleik á netinum, men Býarbókasavnið í Havn hevur í nøkur ár bjóðað lánarum sínum atgongd til danskar tænastur við bæði donskum og enskum tilfari.

Á vísindabókasavnsøkinum er atgongd til vísindaligt talgilt tilfar, greinar og dátugrunnar, skipað í samstarvinum FRIS (Faroese Research Information Service), sum Landsbókasavnið umsitur. Høgi kostnaðurin á slíkum tilfari ger tó, at føroysk gransking og hægri útbúgving bara hevur atgongd til ein brotpart av tí, sum tey hava tørv á, og sum tey hava aðrastaðni.

Atgongd til talgilt tilfar til miðnám og fólkaskúla er væl skipað í samstarvinum EBI (Elektroniskar Bókasavnstænastur á Internetinum), sum Landsbókasavnið eisini umsitur, men støðan her er tann sama sum við FRIS, at atgongdin til tilfar er avmarkað. Hetta ger, at miðnámsskúlar leita sær aðrar vegir at fáa atgongd, til dømis við at fara upp í danskt samstarv.

Landsbókasavnið hevur seinastu tjúgu árini staðið fyri talgilding av føroyskum bløðum og tíðarritum, sum allir føroyingar í dag hava atgongd til. Stórur tørvur er á at samskipa økið og útvega skipanir, so at tænasturnar verða dagførdar og mentar eftir nútímans tørvi.




*Ljóðbøkur. Mynd: Haldur Suni Johansen*

# Tilmæli

Mælt verður til, at Landsbókasavnið fer undir eina miðvísa ætlan fyri at menna talgildar bókasavnstænastur til fólkabókasøvn og skúlabókasøvn við føroyskum e-bókum og netljóðbókum, og at lóggávan sum heild verður dagførd og nágreinað viðvíkjandi teimum talgildu tænastunum.

# Bókmentir í úrvali


1. Føroya landsstýri. *Álit um almanna- og skúlabókasøvn / greitt úr hondum hevur nevndin, Føroya Landsstýri setti november 1986*. (Landsskrivstovan, 1987).

2. *Álit um savnsbygnað*. (Mentamálaráðið, 2009).

3. *Bibliotekens internationella manifest.* (Svensk biblioteksförening, 2014).

4. Charter of PLR Best Practice.

5. Madsen, M. C. f. *Det integrerede bibliotek: nye roller til skolen og biblioteket; en kogebog / tekst og redigering: Monica C. Madsen*. (Bibliotekarforbundet Danmarks Biblioteksforening Danmarks Skolebibliotekarer, 2005).

6. Bókasavnsleiðarar. *Ein ætlan til menning av føroysku fólkabókasøvnunum*. (2013).

7. *Endurskoðan av lóg um gransking.* (2018).

8. *Fólka- og skúlabókasøvn : frágreiðing til landsstýrismannin*. (2007).

9. Thorhauge, J. *Fortællingen om tilblivelse og implementering: lov om biblioteksvirksomhed*. Danmarks biblioteker 24, 28–30 (2020).

10. Næs, M. f. *Fra spadestik til global udfordring: en del af den kulturelle kapital; litteratursociologisk analyse af det færøske bogmarked ved årtusindskiftet*. (MNæs, 2005).

11. Larsen, H. *FU Færøernes Universitet: strategisk campusplan*. (2018).

12. Jacobsen, E. f, Hansen, H. f & Debes, D. *Landsbókasavn og Universitetsbókasavn*. (Føroya Landsbókasavn, 2013).

13. *Libraries | WBDG - Whole Building Design Guide*. https://www.wbdg.org/building-types/libraries.

14. *Ljóðbøkur í Føroyum: 2018-2019*. (2018).

15. *Ljóðbøkur og e-bøkur*. (Mentamálaráðið, 2015).

16. *Løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005*. https://logir.fo/Logtingslog/79-fra-08-05-2001-um-bokasovn-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-148-fra-20-desember.

17. *Morgendagens bibliotek*. Danske kommuner 47, 22–23 (2016).

18. International Federation of Library Associations and Institutions. *Multicultural Communities: Guidelines for Library Services*. ThirdEdition. (2009).

19. Mønsted, S. *Ny bibliotekslov i Norge og Holland har styrket bibliotekerne*. Bibliotekarforbundets fagmagasin Perspektiv 30–32 (2018).

20. Benner, T. *Skal biblioteker have fri adgang til at udlåne forlagenes e-bøger?* Politiken 6–7 (2017).

21. Unesco. *Unesco public library manifesto*. (Unesco, 1975).

22. UNESCO. *UNESCO School Library Manifesto: the school library in teaching and learning for all*. (IFLA Headquarters, 2000).

23. *Uppskot um løgtingslóg um bókasøvn*. (Mentamálastýrið, 2001).

24. *Visjónir og viðmerkingar til uppkast til lógaruppskot um bókasavnsvirksemi*. (2014).

25. Føroya landsbókasavn & International Federation of Library Associations and Institutions. *Yvirlýsingin um fólkabókasøvn* / Unesco. (Føroya landsbókasavn, 1995).

ISBN 978-99918-852-6-1

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ